www.reyniservice.fo




## Corolla Verso 1.6 Basic

Hevur tú tørv á einum stórum familjubili, so hava vit rætta bilin til tín. Corolla Verso er ein dygdargóður familjubilur við framúr koyrieginleikum og komfort.

**REYNI SERVICE** P/F

Vegurin Langi 188 Hoyvík tlf. 35 30 40
Klingrugarður 700 Klaksvík tlf. 47 30 40



# AÐALSTJÓRI TIL ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

sansir.fo

Aðalstjórin verður ovasti ráðgevi hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum og fer at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Almannamálaráðnum. Økið fevnir um: almannamál, familjumál og bústaðarmál.

**Høvuðsuppgávur:**
· Leiða og samskipa arbeiðið í ráðnum
· Samskipa og fyrireika uppgávur í omanfyri nevndu málum
· Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan virkisøkið
· Eftirlit við stovnum undir Almannamálaráðnum
· Aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur kandidatútbúgving frá lærdum háskúla og leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum. Umráðandi er, at tann, ið verður settur, hevur góð evni at samstarva og samskifta, umframt at seta greið mál og skapa úrslit. Viðkomandi skal duga at síggja heildir uttan at missa burtur týdningarmiklar smálutir og skal kunna arbeiða við nógvum málum í senn. Viðkomandi skal duga væl at raðfesta, samskipa og útdelegera.

Tann, ið verður settur, skal hava gott innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting. Týdningarmikið er, at viðkomandi hevur vilja og hegni at ganga nýggjar leiðir.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv, starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki. Harumframt er ein mánaðarlig viðbót uppá 4.763 kr. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Setanarøkið fevnir um Almannamálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Almannamálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttir, løgmansstjóra, tlf. 55 10 30.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu stílast til løgmann, og sendast Løgmansskrivstovuni, Marjuni Hanusardóttir, løgmansstjóra, postsmoga 64, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 16. mars 2009 kl. 12. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

---

Almannamálaráðið er eitt av stjórnarráðunum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Miðfyrisitingin er fremst í nýskapan, arbeiðslagi og samskifti. Landsstýrismaðurin í almannamálum umsitur málsøkini almannamál, familjumál og bústaðarmál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office